# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Faroe Dive, Klaksvík:

## Tríggir næmingar fingið kavaraprógv

**Leygardagin 26. mars 2005 fingu tríggir næmingar Víðkað-Kavaraprógv frá Faroe Dive í Klaksvík.**

Tey hava seinastu vikurnar staðið royndir í ymiskum serøkjum innan kaving, náttarkaving, djúpdarkaving, navigatiónskaving, leitan & heintan og kaving á ymiskum dýpdum.

Undirvíst hevur verið bæði í teori og praktiskari kaving. Tey sum fingu prógv eru: Hans í Gerðinum, Vestmanna, Jóna Astrid Lambastein, Fuglafjørður, og Oddur H. Lamhauge, Saltangará.



*Leygardagin 26. mars 2005 fingu hesi Víðkað-Kavaraprógv frá Faroe Dive í Klaksvík, f.v.: Hans í Gerðinum, Vestmanna, Jóna Astrid Lambastein, Fuglafjørður, Oddur H. Lamhauge, Saltangará, og Janus Joensen, instruktør, Klaksvík*

# Sangur av hjartans lyst



*Barnakórið í KFUM & K setti sín serstaka dám á. Hóast tey ikki vóru fullmannað og ikki høvdu vant í eina ti´ð, so sungu tey av hjartans lyst sínar sangir*



*Tey vaksnu sungu væl við í sangunum – her í sanginum "Djúp og breið"*

### Hugnalig sangløta í Kunoyar kirkju skíriskvøld

BARNAGUDS-TÆNASTA
*Snorri Brend*

**Kunoy:** Tað er ikki á hvørjum degi, at kirkjan í Kunoy er fullsett av syngjandi børnum.

Tað var júst hetta sum hendi skírískvøld, tá fólk í bygdini, saman við fólki úr KFUM & K í Klaksvík skipaðu fyri eini sangløtu í kirkjuni.

Við hesa gudstænastuan sang eisini barnakórið í KFUM & K, og settu á henda hátt sína serliga dám yvir sangløtuna, har bæði børn og vaksin úr og av bygdini vóru samankomin.

Børnini livdu við í teimum kendu barnasangunum, og tey vaksnu sungu somuleiðis væl við.

Á skránni var fyrst og fremst sangur, men eisini ein frásøgn um hendingarnar á páskum. Hetta varð gjørt á ein sera livandi hátt við flonellografi, har lagt varð upp til at børnini skuldu skilja, at hesin boðskapurin eisini var viðkomandi í dag.

Undirtøkan til sangløtuna var so mikið góð, at neyðugt varð at seta inn eyka stólar í kirkjuna.

Hetta man geva fyrireikarunum eitt gott høvi til og hug at skipa fyri eini líknandi sangløtu einaferð seinni.